# Politisku ungamanna-feløgini kjakast á Rás 2

**Fimm av politisku ungmannafeløgunum í Føroyum eru farin undir eina røð av politiskum kjaksendingum á Rás 2**

ÚTVARP
*Heri á Rógvi*

Fimm politisk ungmannafeløg í Føroyum hava nú tikið til annan miðil fyri at kjakast teirra millum. Politisku ungmannafeløgini skipa saman við Rás 2 fyri fimm politiskum sendingum. Fyrsti tvær sendingarnar hava longu verið.

Sendingarnar eru skipaðar á tann hátt, at eitt ella tvey umboð fyri eitt politiskt ungmannafelag leggja fram í einar tjúgu minuttir. Hini politisku ungmannafeløgini hava so eitt umboð hvør í útvarpsstovuni. Ætlanin er so, at øll umboðini skulu kjakast um tað, ið er lagt fram. Tú sleppur ikki undan, at tað verður tað eitt felag, ið er í andgletti. Tað er bannað valevnum at vera við í sendingunum, men hetta forðar ikki fyri lívligum kjaki. Higartil hava Fólkafloksungdómur og Sjálvstýrisungdómur (sent týsdag og endursent mikumorgun) verið í útvarpsstovuni og lagt fram. Eftir páskir, týsdagin 2. apríl, eigur fyrst Ungmannafelagið Samband, síðani Sosialistiskt Ungmannafelag og síðsta sendingin verður hósdagin 4. apríl, tá Unga Tjóðveldið fer at leggja sín boðskap fram. Sendingar verða vanliga sendar kl. 15.30.

### Kjans at upplýsa

Sonne Smith frá Rás 2 upplýsir, at teir eru farnir undir hesar sendingarnar fyrst og fremst tí, at teir ætla at geva politisku ungmannafeløgunum ein møguleika at upplýsa um seg sjálvi og arbeiði hjá teimum. Tað vóru feløgini sjálvi, ið tóku stig til sendingarnar.

– Eg haldi tað hevur týdning, at ungdómurin veit, hvat tað er, sum gongur fyri seg í politikki í Føroyum. Eg haldi, at fyri tað nógva er ungdómurin ógvuliga óvitandi um hesi fyribrigdi, sigur Sonne Smith.

Hóast einki valevni er við í sendingunum, so ivast Sonne Smith ikki í, at tað verður eitt sindur av valagni, men hesum slepst ikki undan, heldur hann. Tað er eisini í sambandi við valið, at Rás 2 saman við feløgunum hevur tikið stig til hesar sendingarnar.



Politisku ungmannafeløgini eru farin at dystast í útvarpi, og tey eru til dystin fús.

# Føroya Bjór heiðrað fyri páskabryggi

**Selskab for Vestjysk Ølkultur hevur smakkað tey nógvu ymsu sløgini av páskabryggini. Harímillum var páskabryggi hjá Føroya Bjór, ið varð sagt at vera hitt næstbesta**

ØL-KAPPING
*Heri á Rógvi*



*Einar Waag og hansara páskabryggj vórðu heiðraði við aðru viðursløn av Selskab for Vestjysk Ølkultur.*

Selskab for Vestjysk Ølkultur hevur kosið Føroya Bjór páskabryggi sum hitt næst besta páskabryggi í gullstyrki klassanum. Sambært Dimmalætting hittast limirnir í Selskab for Vestjysk Ølkultur til ølsmakking av og á. Teir fáa blind fyri eyguni, soleiðis at teir ikki vita, hvat slag teir smakka. Um hetta var tað, ið gjørdi útslagið, er ikki gott at vita, men í øllum førum fekk ølið frá Føroya Bjór eitt flott annað pláss fyri teirra páskabryggj í gullstyrki klassanum. Samanlagt varð tað til eitt fjórða pláss fyri allar ølirnar í øllum klassanum. Tað er føroyingurin Bjarne Juul Pedersen, sum hevur syrgt fyri, at teir í vestur Jútlandi sluppu at smakka tað føroyska bjórið eisini. Hann er búsitandi í Føroyum, men er limur í Selskab for Vestjysk Ølkultur kortini, og hann var eisini við til smakkingina.

Tað er vert at leggja til merkist, at tað so kenda páskabryggi hjá Tuborg endaði á einum aftasta plássi í tí klassanum, har Føroya Bjór fekk heiðurin at verða nummar tvey. Nummar eitt í kappingini gjørdist Hancock Påske Beer, ið er eitt lokalt merki í Jútlandi.

### Herðaklapp

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, sigur, at hann tekur hetta sum eitt herðaklapp.

– Eg eri serliga stoltur av, at vit vunnu á so kendum merkjum sum Ceres og Tuborg, sigur Einar Waag.

Hann upplýsir, at teir longu útflyta eitt sindur til Íslands og til Danmarkar. Tað er Føroya húsið, sum stendur fyri søluni av Føroya Bjór í Danmark, sum tó – enn – bert er til nakrar fáar barrir og matstovur.

Einar Waag roknar ikki við, at útflutningurin fer at veksa nakað munandi av hesum, men hann er glaður fyri at hava fingið hesa viðurkenningina.

# Free Føroyar við Frændum

**2. páskakvøld verður skipað fyri einari Free Føroyar konsert í Klaksvík. Millum luttakandi bólkarnar verður Frændur**

KONSERT
*Heri á Rógvi*

Unga Tjóðveldið og teirra Tónleikarar fyri loysing fara nú aftur í eldin. Hesaferð stendur Klaksvíkin fyri tørni. Free Føroyar eitur tiltakið, ið hevur verið fleiri ferðir áður. Konsertini hava verið hildnar fyri tað nógva í Havn, men fyri góðum tveimum vikum síðani varð skipað fyri einari Free Føroyar konsert í Skopun. Henda konsertin eins og fleiri av teimum undanfarnu hava verið væl vitjaðar. Hesaferð ætlar Unga Tjóðveldið og teirra fólk at spíla seg enn meira út.

Luttakandi bólkar verða: Frændur, Flux, Marigold, Side Effect, Iris, Human Caos og Tourist. Millum hesar eru fleiri kendir bólkar. Fleiri av bólkunum hava eisini roynt seg í Free Føroyar høpi áður.

Tað er heldur ikki á hvørjum degi longur, at Frændur trína fram á pallin. Teir tríggir, Eyðun Nolsøe, Rani Nolsøe og Steintór Rasmussen, mannað nokk best umtókta føroyska bólkin nakrantíð, sum myndar ein stóran part av nýggjari føroyskari tónleikasøgu. Tað er tó vorðið longur og longur ímillum, at allir í bólkinum saman trína á pallin. Seinast vit sóu bólki var á ólavsøkukonsertini, tá teir vóru høvuðsnavn. Teir finna so eftir øllum at døma samanaftur annað páskakvøld, 1. apríl, saman við hinum seks bólkunum til Free Føroyar konsertina.

Konsertin verður hildin í KÍ-høllini. Tiltakið byrjar kl. 22, og fyrireikararnir lova eina góða og frælsa konsert. Kostnaðurin fyri atgongumerkið er 50 kr.



*Tað er ikki á hvørjum degi, at Frændur eru á pallinum alment saman, men sjálvan fyrsta apríl vera teir á pallinum í KÍ-høllini.*



# Skúlar á hitlistum – millum lærdar háskúlar í Aberdeen

**Tað verður gjørt nógv burturúr, at ein skúli liggur ovarliga á hitlistanum yvir skúlar. Tað er so ymiskt, hvat skúlarnir leggja dent á, men tær dáma allir líka væl at fortelja um rókaplássini á teim ymsu tindunum**

ÚTBÚGVINGAR / HUGLEIÐINGAR
*Heri á Rógvi*

*Vakurt sær tað út; Robert Gordon University. Robert Gordon er bæði college og university, og tað skortar heldur ikki við skúlabúnum. Skúlin leggur stóran dent á at vera modernaður.*
*Mynd: Heri á Rógvi*



**Aberdeen:** Í skotska stórbýnum og føroyska ferðamálið Aberdeen eru nógv lesandi. So nógv, at býurin líkist ein lestrar býi burturav. Gamli fiskivinnubýurin hevur upplivað eina stóra innrás frá oljuvinnuni. Hetta merkist allastaðni – eisini innan skúlaverkið. Hægri lærustovnarnir eru farnir undir at bjóða fleiri og fleiri útbúgvingar, ið eru serliga ætlaðar til oljuvinnuna.

Nakað, ið alsamt er við at gerast meira vanligt í Føroyum, er, at skúlar eru farnir at kappast um næmingar, og hetta ger seg í alstóran mun eisini galdandi í Skotlandi. Ikki nokk við tí, at næmingarnir eru vorðnir vøra, men lærdu stovnarnir eru eisini farnir at hugsa øðrvísi, tá næmingarnir koma inn á skúlan. Tað er kapping á marknaðinum, og tá er neyðugt at hava nakað at lokka næmingar við. Landsins myndugleikar royna eisini skúlarnir fyri at vita eftir, hvussu m.a. frálærustøðið er. Eisini verður fylgt væl, hvussu væl ella illa teir útbúgnu næmingarnir, ið fara frá skúlunum klára seg.

Vit hyggja nærri at tveimum lærdu háskúlum í Aberdeen.

### University of Aberdeen

Tað gamla, kenda og etableraða universiteti í Aberdeen er University of Aberdeen. Tað er ógvuliga týdningarmikið ikki at siga Aberdeen University, men University of Aberdeen. Tað var í 1495, at tað, ið seinni skuldi eita University of Aberdeen, varð sett á stovn. Søgan hjá hesum lærda háskúlanum er sostatt ógvuliga rík og gomul. Talan er um triðelsta universiteti í Skotlandi.

Universiteti er í nógvar mátar eisini ein blandingur av nógvum ymiskum. Fyrst og fremst ein blandingur millum gamalt og nýtt. Fyrsti bygningurin, ið vitjaðu fekk ikki beinleiðis tey mest superlativu lýsingarorðini fram, tí bygningurin virkar slitin, og hølini tykist ómodernað. Blíðskapurin bilar tó einki, og vit fáa bæði vátt og turt. Fyrst á skránni er ein kunning um Geoschience og Geology og Petroleum Geology. Sum vera mann, tá oljuvinnan er beint uttanfyri dyrnar, so hava skotarnir á University of Aberdeen eisini gjørt sær útbúgvingar, ið eru serliga ætlaðar til oljuvinna. Hetta lokkar eisini fólk til universiteti. Samanlagt eru yvir 10.000 lesandi á University of Aberdeen. Vanligt er, at skotskir ungdómar byrja á universiteti um 17-18 ára aldur. Andrew Hurst greiðir okkum frá um teir meira oljurelateraða útbúgvingar, ið skúlin bjóðar. Hann sigur, at ein av orsøkunum til, at áhugin er so stórur fyri hesum slagnum av útbúgving er, at sjónvarpsrásir hava víst sendingar um jarðfrøði í prime-time, sum tað kallast. Hetta er um 7-8 tíðina á kvøldið. Eisini eru nógvir pengar í oljuvinnuni, og hetta er nakað, ið dregur. Eisini fara tey, ið lesa tey ymsu sløgini av jarðfrøði, nógvar ferðir uttanlands. USA og Frakland teljast millum mest vanligu støðini hjá teimum at vitja.

Á University of Aberdeen kanst tú lesa mestsum hvat tú vilt. Her er frálæra í øllum møguligum fakum. Á rundferð varnast tú eisini tær framúr vøkru bygningarnar rundanum universiteti. Her er nógv søga at hóma, og traditiónirna viga nógv her. Vit verða m.a. víst í kapel, sum drótningin plagar at vitja. Alt hetta er ein partur av søguni hjá skúlanum. Eitt søguliga ríkt og dygdargott universitet.

### Robert Gordon University

Á University of Aberdeen leggja tey stóran dent á at vísa okkum á, at teirra frálærustøði er sera høgt. UK Quality Assurance Agency for Higher Education (QAA) hevur University of Aberdeen í teirra topp tíggju, og hetta hava tey einki ímóti at fortelja tær sum vitjandi.

Myndin er tó ein onnur á Robert Gordon University. Fyrsta myndin, ið møtir tær, eru vakrir eldri bygningar og ungdómar í skúlabúnum. Fyrsti orðið, ið vit hoyra frá fólkunum á skúlanum, er arbeiðsmøguleikar. Beinanvegin verður tað gjørt púra greitt, at her verður hugsað nógv arbeiðsmøguleikarnar hjá teimum lesandi, tá hesi verða liðug við teirra útbúgving. Teir kalla seg fyri eitt vocational ella arbeiðssøkjandi universitet, sum finnur sína topp tíggju plasering í listanum yvir universitet, har tey júst lidnu finna arbeiði innanfyri eina ávísa tíðarfreist. Hetta leggja tey stóran dent á. Skúlin hevur eitt stórt kontór, ið bara tekur sær av at hyggja at arbeiðsmøguleikum. Gjørt verður upp fyri hvørja fyritøka sær. Tey siga okkum, at tað kann gott betala seg at koma frá Robert Gordon University, tá tú skal leita eftir arbeiði. Á University of Aberdeen hildu tey ikki so nógv um Robert Gordon University, men á Robert Gordon University vilja tey ikki so fegin gera viðmerkingar til starvsfelagarnar á University of Aberdeen.

Stórur dentur verður lagdur á at vera modernaður. Alt skal vera nýtt sum gjørligt. Útbúgvingarnar, teir bjóða, eru mest handils- og búskaparútbúgvingar, ið tað eisini er eftirspurningur eftir. Har ber ikki til at lesa heimspeki, men har eru góðir arbeiðsmøguleikar.



*Andrew Hurst er lektari á University of Aberdeen. Hann undirvísir og granskar serliga í petroleum jarðfrøði.*
*Mynd: Heri á Rógvi*



*Klassi av Studentaskúlanum í Hoydølum vitjaði fyri kortum í Aberdeen. Fremst til høgru á myndini sæst Scott Styles, ið er professari í løgfrøði. Aftanfyri næmingarnar sæst gamla áskriftin á latíni.*
*Mynd: Heri á Rógvi*